# HJÁLP AFRIKA
## - EITT LÍV, EIN VÓN

GEV KR. 100,- NÚ VIÐ AT RINGJA TEL +298 905600
ELLA FLYT PENING Á KTO 6460-175.615.1





Síðani **HIV & AIDS** kyknaðu upp, hevur sjúkan havt álvarslig árin á øll øki í samfelagnum - serliga í tilafturskomnum londum. Sjúkan hevur við sær, at talið av fólki í arbeiðsførum aldri minkar í stórum. Samstundis gerast nógv børn foreldraleys, og onnur verða smittað.

Av tí, at ein stórur partur av kvinnunum hvørki dugir at lesa ella skriva, og ikki hevur somu atgongd til útbúgving sum menn, gerast tær tíðliga við barn. Av 109.200 kvinnum, ið gerast við barn hvørt ár í Uganda, verða 29.484 børn fødd við smittuni.

Foreldraleys børn verða vanrøkt, fáa ikki neyðuga læknahjálp og uppliva kenslulig trauma orsakað av sjúku, einsemi, sorg og sakni.

**SAMKOMAN LÍVDIN SKIPAR FYRI TILTAKI Í OASUNI Í HOYVÍK FRÍGGJAKVØLDIÐ KL 20.30 (FO-TÍÐ)**

**SAMKOMAN KRISTNASTOVA SKIPAR FYRI TILTAKI Í FØROYAHÚSINUM Í KEYPMANNAHAVN FRÍGGJAKVØLDIÐ KL 20.30 (DK-TÍÐ)**



DVD: Samrøða við Bono frá U2, um **HIV/AIDS** katastrofuna í Afrika, umframt framførsla og kunning um átakið. Peningur verður eisini savnaður inn til endamálið.

Vitja **www.kristnastova.dk** og fá meir at vita.

**Kristnastova, Lívdin og Samaritan's Purse**



Myndirnar eru frá heiminum Jajja í Kampala. Jajja er eitt serligt kristiligt átak, ið hevur til endamáls at minka um árinið av **HIV & AIDS** á børn við at veita læknaligar metingar, umsorgan og viðgerð av sjúkum børnum, ráðgeving og andaliga vegleiðing, ráðgeving um kostvanar, persónligan stuðul, og við at læra tey okkurt handaligt umframt at stuðla teimum við stuttleika og spæli. Matur, klæðir og innivist verður eisini veitt eftir tørvi. **Heimið Jajja varð innstillað til »Best practice« av bæði UNAIDS og »Økisráðnum fyri góðsku« í 2003.**